# ítróttur

Nr. 69 • Skírisdagur • 8. apríl 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Christian Høgni úti av spælinum í eitt ár

**Nú fleiri feløg vístu áhuga fyri honum, og hann stóð á gáttuni at gera av, hvussu fótbóltsframtíðin skuldi verða, hevur krossbandsskaði við sær, at álopsspælarin í Vejle einki kann gera við fótbóltin næsta árið**


ILLA SKADDUR ÚTISETI

*Jóannes Hansen*




*Fram til fyrrapartin í gjár helt Christian Høgni, at tað var meniskurin, sum var trupulleikin, men tíverri er støðan álvarsligari enn so*

Tað gongur skjótt hvønn vegin í fótbólti. Hetta hevur so ofta verið at hoyrt, og nú er tað enn eina ferð staðfest. Í innlegginum um fótbólt, sum er lagt inn í blaðið í dag, er skrivað um Christian Høgna Jacobsen og Ian Højgaard, sum báðir higartil hava verið knýttir at Vejle í næstbestu donsku deildini. Í gjár var søgan, at Ian Højgaard hevur sagt upp í Vejle, sum ikki hevur viljað givið honum nakra samsýning fyri at spæla.

Og í dag er søgan um Christian Høgna Jacobsen uppaftur meiri harmulig. Í fyrradagin varð á sjúkrahúsi í Kolding, har Ole Dichman er serlækni, sum hevur tikið sær av nógvum ítróttarfólkum, staðfest, at fremra krossbandið í øðrum knænum hjá Christian Høgna er farið. Tað er neyðugt við skurðviðgerð. Hon er ásett at skula vera 16. apríl. Næstu átta vikurnar eftir skurðviðgerðina skal Christian Høgni binda fullkomuliga frið, og so skal hann so spakuliga fara undir uppvenjingina, sum tað verður vónað fer at hava við sær, at hann um eitt ár aftur verður førur fyri at spæla fótbólt.

## Krossbondini kosta nógv

Diagnosan hjá fremsta manninum á landsliðnum er mest sum meinlík henni hjá aftasta verjuspælaranum á landsliðnum. Nógvu teir seinastu mánaðirnar hevur Jón Rói Jacobsen stríðst – og hann stríðist enn – við at koma fyri seg aftur, eftir at tað var neyðugt at skurðviðgera krossbandið. Hjá Jón Róa hevði skaðin við sær, at hann ikki slapp at halda fram at spæla fótbólt í Brøndby.

Hvørjar avleiðingar skaðin hjá Christian Høgna fer at hava við sær, ber ikki til at siga nakað um enn. Men tað sigur seg sjálvt, at álvarsami skaðin fer at hava avleiðingar fyri fótbóltsframtíðina, sum annars tóktist heilt spennandi.

– Sáttmálaskeiðið í Vejle verður liðugt síðst í juli. Síðsta tíðina havi eg tosað við Vejle. Teir hava sagt seg vera áhugaðar í at leingja samstarvið, og teir hava hava lagt uppskot um nýggjan sáttmála fyri meg. Onnur feløg hava eisini boðað frá, at tey hava verið áhuga í at fylgja við í, hvussu tað hilnaðist hjá mær nú í vár. Tað gjørdu tey, tí tey vóru áhugað í at kanna, um tey mettu meg vera ein møguligan framtíðar spælara hjá teimum. Nú er eingin møguleiki fyri hesum. Í hvussu so er ikki næsta árið, staðfestir Christian Høgni Jacobsen, sum leggur afturat, at okkurt av feløgunum, sum hann hevur havt samband við, er umboðað í superliguni.

– Hetta er so harmuligt og kom so illa við, at tað ikki enn er rættuliga runnið upp fyri mær, sigur Christian Høgni Jacobsen úr Vejle. Hann greiðir frá, at inntil fyrrapartin týsdagin helt hann, at tað var meniskurin, sum tað var galið við:

– Eg merkti eitt sindur til pínu, tá ið vit fyri góðum tveimum vikum síðani høvdu spælt ímóti Horsens. Síðani havi eg ikki verið førur fyri at spæla við í d y s t u m . Fystioterapeutarnir hildu ikki, at talan var um álvarsligan skaða. Eg royndi at venja, men týsdagin í síðstu viku var heilt galið. Tað dragnaði í knænum, tá ið eg royndi at seta av fyri við høvdinum at senda bóltin ímóti málinum. Eg var í skannara her í Vejle, og tað varð mett, at tað var meniskinum, sum tað bilaði við. Tað var ásett, at eg skuldi leggjast undir skurð 14. apríl. Men teir í felagnum hildu, at hetta var ov leingi at bíða. Teir ynsktu, at tað varð skundað undir viðgerðina. Tí sendu teir meg til privat sjúkrahús í Kolding. Har var tað, at teir týsdagin staðfestu, at talan als ikki var um menisksskaða, men heldur um krossbandsskaða, greiðir Christian Høgni Jacobsen frá.

Hann hevur glett seg til at vera partur av landsliðnum, sum í juni skal spæla ímóti Hollandi og seinni í heyst ímóti Fraklandi. Nú er Christian Høgni greiður yvir, at hann ongan lut fer at eiga í hesum.

## Framtíðin

Christian Høgni er fevndur av generellu tryggingini, sum allir fótbóltsspælarar í Danmark hava umvegis feløgini. Síðani hann fór til Danmarkar at royna seg sum fótbóltsspælari, hevur hetta verið fulltíðar starv hjá fyrrverandi NSÍ spælaranum. Hvat tíðin skal ganga við næsta árið, umframt at hann skal stríðast við venjingar, ið hava sum mál at vinna førleikan í knænum aftur, hevur Christian Høgni Jacobsen ikki enn gjørt upp við seg sjálvan. Áðrenn hann flutti til Danmarkar, leyk hann hægri handilsskúlaprógv á Kamsdali.

– Nú halda vit páskir, og so skal eg leggjast undir skurð. Tað verða ivaleyst góðar stundir at hugsa um møguleikarnar í framtíðin. Eg havi ikki slept dreyminum at liva av at spæla fótbólt. At álvarsami skaðin hevur minkað nógv um vánirnar sigur seg sjálvt.

Onkuntíð áður hevur Christian Høgni verið skaðaplágaður. Men tað hava verið skaðar, sum einki hava havt við nýggja skaðan at gera.

– Talan hevur verið um smávegis vøddaskaðar í lørunum. Eg havi hildið, at hetta hevur havt við graslíkisvallirnar í Føroyum at gera. Men talan hevur ongantíð verið um álvarsamar skaðar av tí slagnum, sum nú heldur mær burtur frá fótbóltinum.



# Ársins hondbóltslið 2004

**Nú hondbóltsárið er farið aftur um bak, hava ítróttarskrivararnir her á blaðnum til stuttleikar sett ársins lið bæði hjá kvinnum og monnum**


DREAM TEAM

*Jákup Mørk/Terji Nielsen*

*jakup@sosialurin.fo*

*terji@sosialurin.fo*


Seinni í hesum mánaðinum fara hondbóltsleikarar úr øllum landinum at savnast til hondbóltsgallakvøld, har ársins leikarar og annað verður kosið. Til stuttleikar hava vit her á blaðnum gjørt eitt uppskot til ársins lið bæði hjá kvinnum og monnum út frá teimum eygleiðingum, ið vit hava gjørt gjøgnum eitt heilt kappingarár.

## Útlendskt kvinnulið

Ársins lið hjá kvinnum er fyri ein stóran part mannað av útlendskum leikarum. Ikki færri enn fimm av teimum sjey leikarunum eru útlendingar, og tað skerst ikki burtur, at teir mongu útlendsku hondbóltsleikararnir hava sett sín dám á kappingina í ár, serliga hjá kvinnunum. Einastu føroysku kvinnurnar, ið sleppa upp í part, eru vengurnir báðir, í vinstru síðu Gurið Mortensen úr VB, og í høgru Bára Skaale Klakstein úr Stjørnuni.

Bert trý feløg eru umboðaði á ársins kvinnuliði, og tey eru føroyameistararnir úr Stjørnuni við trimum umboðum, silvurvinnararnir úr VB við tveimum, og bronsuvinnararnir úr VÍF eisini við tveimum umboðum.

## Neistin flest umboð á mansliðnum

Hjá monnunum er støðan ein onnur, enn hvat hon er hjá kvinnunum. Her eru føroyingarnir við yvirlutan, av tí at fimm av teimum sjey leikarunum eru føroyingar, meðan bert tveir útlendingar sleppa upp í part. Tað áhugaverda við mansliðnum er tað, at her er Neistin best umboðað við trimum umboðum, og tað kundi kanska bent á, at neistaliðið hevur flest profilar, men kanska ikki størstu breiddina. Fýra feløg hava umboð á ársins mansliði, og umframt trý umboð úr Neistanum, hava føroyameistararnir úr Kyndli tvey umboð, meðan VÍF og KÍF hava hvør sítt umboð.

# Kvinnuliðið



**Málverji:**
**Lidia Vladic, Stjørnan**

Sterki málverjin hjá Stjørnuni, Lidia Vladic, hevur í nógvum dystum – serliga móti kappingarenda – víst seg sum ein av mest týðandi leikarunum, ið kann vinna ein dyst fyri liðið hjá sær.



**Vinstri vongur:**
**Gurið Mortensen, VB**

Gurið Mortensen er ikki nakar ársungi í føroyskum kvinnuhondbólti, men hon tykist bara gerast betur og betur fyri hvørt einasta ár. Á einum sterkum VB-liði, har útlendsku leikararnir ofta skara framúr, er Gurið einasti spælarin, ið er á hædd við útlendingarnar



**Vinstri bakkur:**
**Alina Olaru, Stjørnan**

Stjørnan gjørdi kvettið, tá ið tað eydnaðist klaksvíkingum at fáa Alinu Olaru at skifta frá StÍF til Stjørnuna miðskeiðis í kappingarárinum. Alina hevur í seinnu helvt av landskappingini og í steypafinaluni víst seg sum mest avgerandi leikaran á liðnum hjá Stjørnuni.



**Spælskipari:**
**Aukse Vysniaskaite, VB**

Drívmegin á liðnum hjá VB er uttan iva spælskiparin Aukse. Í nógvum dystum har tað hevur staðið á hjá VB, hevur Aukse víst seg sum ein leikara, ið tekur sakina í egnar hendur til fyrimuns fyri sítt lið. Gjøgnumbrotsstyrkin hjá Aukse er allarhelst eindømi í føroyskum kvinnuhondbólti.



**Høgri bakkur:**
**Ioana Rapa, VÍF**

Ioana Rapa hevur ovurhonds stóran týdning á liðnum hjá VÍF. Kappingarárið í ár hevur verið eitt tað besta hjá Ioanu, síðani hon kom til Føroya, og her verður ikki bert hugsað um skotstyrkina hjá henni. Umframt mongu málini, ið hon skýtur, hevur Ioana eisini havt eitt hav av fríspælingum til Irinu Radovici á strikuni hjá VÍF.



**Høgri vongur:**
**Bára Skaale Klakstein, Stjørnan**

Stjørnan hevur fingið eina rúgvu av málum upp á skjótálop í ár, og ein sera stórur partur av hesum málum hevur Bára Skaale Klakstein skorað. Við sínum skjótleika er Bára ein støðug hóttan fyri mótstøðuliðini, og hon hevur verið rættuliga sikkur, tá ið møguleikin hevur verið har.



**Strikuspælari:**
**Irina Radovici, VÍF**

Tað hevur verið ein sonn gleði at eygleitt samanspælið millum Ioanu Rapa og Irinu. Umframt at verða ósvikaliga trygg, ta ið høvi býðst, er Irina Radovici ein sera sterkur verjuleikari, ið VÍF hevur havt stóra gleði av í hesum kappingarárinum.

# Mansliðið



**Málverji:**
**Eli Müller, VÍF**

Nógvir stinnir málverjar eru í føroyskum manshondbólti, men í ár hevur Eli Müller skarað framúr. Eli er ein málverji, ið bara veksur við uppgávuni, og eisini á landsliðnum hevur hann verið serstakliga góður í ár. Mangan verður tikið til, at ein hondbóltsmálverji skal verða eitt sindur svakur, og Eli hevur eitt sindur av hesum villskapi í sær, og tað kemur mangan væl við í avgerandi løtum.



**Vinstri vongur:**
**Blagoje Buha, Neistin**

Tað er einki at ivast í, at Blagoje Buha hevur sligið sítt navn fast í føroyskum hondbólti í sínum fyrsta ári her á klettunum. Fær Buha møguleikan, er tað næstan hundrað prosent sikkurt, at hann skorar. Heldur ikki tørvar Buha nógv pláss fyri at fara ígjøgnum, og við sínum kviku fótfintum hevur hann hildið mangan verjuspælara fyri gjøldur.



**Vinstri bakkur:**
**Damir Oros, KÍF**

Kollfirðingar hava í Damir Oros kanska besta skjúttan í føroysku landskappingini. Stóri bakkurin hevur eitt sera gott skot, og hann skal ikki hava nógv pláss fyri at fara upp og langa til. Hóast hann hevur verið mansvardur í so at siga øllum dystum í ár og bert hevur leikt 15 av 20 dystum, endaði Damir Oros ovast á listanum yvir toppskjúttar í føroysku kappingini.



**Spælskipari:**
**Áki Mørk, Neistin**

Á einum neistaliðið, har útlendingarnir hava verið mest eyðsýndu leikararnir, er tað tó ein føroyskur leikari, ið hevur havt ein ógvuliga týðandi leiklut. Áki Mørk hevur stýrt álopsspælinum hjá Neistanum hengisliga, og harafturat er hann ein av okkara bestu kontraspælarum.



**Høgri bakkur:**
**Heini Hanusarson, Neistin**

Nógvir vóru um boðið, tá ið høgri bakkur skuldi veljast. Hóast Heini ikki hevur leikt meira enn eitt hálvt kappingarár í ár, hevur hann víst sína styrki. Tíðin í danska felagnum TMS Ringsted hevur ment Heina nógv sum hondbóltsleikara, og serliga í landsdystunum fyrr í ár vísti Heini sína stóru styrki bæði í álopi og verju.



**Høgri vongur:**
**Josef Abrahamsen, Kyndil**

Josef Abrahamsen hevur veruliga fingið sítt gjøgnumbrot í ár. Hann er ein av fáu leikarunum, ið er veruliga vandamikil á høgra vongi, og hann er ógvuliga tryggur í sínum atsóknum. Við sínum kvikleika hevur Josef verið ein ógvuliga týðandi partur av vandamikla kontraspælinum hjá Kyndli. Josef Abrahamsen er óivað eitt gott boð upp á ársins stjørnuskot í føroyskummanshondbólti í ár.



**Strika:**
**Janus Einar Sørensen, Kyndil**

Janus Einar er uttan iva besti strikuspælarin í Føroyum. Hann hevur neyðugu kropsstyrkina til at taka dystin upp við verjuleikararnar, og evnini at fáa fatur á bóltinum er framúr. Tá ið Janus Einar hevur fingið fatur á bóltinum, er hann ósvikaliga tryggur. Harafturat er Janus Einar ein av okkara allarbestu verjuleikarum.